**Munnligur fyrispurningur til**
**Jørgen Niclasen, landsstýrismann í fíggjarmálum**
**um 3-ára avtalu um hækking av ríkisveitingini**

1. Hvør er orsøkin til, at valt verður at gera 3-ára avtalu um hækking av ríkisveitingini?
2. Hví verður avtala gjørd um hækking av ríkisveitingini eitt heilt ár inn í komandi valskeið?
3. Er ikki nóg mikið, at landsstýrið ger avtalur, ið fevna um valskeiðið og politikkin hjá hesi samgonguni?
4. Hvussu ofta og nær hevur landsstýrið samráðst við donsku stjórnina um, at hækka ríkisveitingina enn meira enn prístalshækkingina?
5. Eru ætlanirnar um, at hækka ríkisveitingina við 200 mió. kr. sleptar?

**Viðmerkingar**
Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur valt at gera eina 3-ára avtalu við donsku stjórnina um prístalshækking av ríkisveitingini. Higartil hevur hetta landsstýrið annars gjørt 1-ára avtalur.
Tað undrar at valt verður at hækka ríkisveitingina, og tað undrar somuleiðis, at stig verða tikin, at halda áfram við hesi hækking inn í komandi valskeið.
Tí nú val í seinasta lagi verður á heysti 2015, tvs. um minni enn 2 ár, vil avleiðingin av eini 3-ára avtalu vera, at landsstýrið ger eina avtalu, ið røkkur væl inn í komandi valskeið.
Eisini hevur løgmaður í fleiri umførum sagt, at ríkisveitingin skal hækkast enn meira. Tað sama ger seg galdandi fyri fíggjarnevndarformannin. Enn er tó ikki eydnast at hækka henda meira enn við prístalshækkingini. Ikki tí, samgonguflokkarnir ikki hava ynskt hetta, men tí danska stjórnin hevur sagt nei. Boðað hevur verið frá, at roynast framhaldandi skal, at hækka ríkisveitingina enn meira.
Fyri at fáa lýst málið, verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 26. november 2013

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi